

ein og hvør stjórn í øllum teimum evropeisku londunum eisini gjørt. Alt annað hevði verið ábyrgdarleyst sæð við teirra brillum

Trupulleikin hjá donsku stjórnini í mun til stjórnir í øðrum kolonilondum, er bert tann, at hon í neyvum samstarvi við føroyskar flokkar, hevur billað føroyingum inn, at Danmark hevur ongin áhugamál í at hava Føroyar undir sínum valdi. At Danmark bert verjir okkum móti tí stóru verð og vil tryggja vælferðina hjá føroyingum. Og hendan fjanti-søgan er serliga skapt í søguliga samstarvinum millum føroyskar og danskar socialdemokratar.

Tí verður alt so óerligt og fylt av hykli. Tí noyðist Nyrup-stjórnin at balla síni áhugamál inn í hesa følsku mynd av, at Danmark hugsar um vælferðina hjá tí vanliga føroyinginum. Og tí tosar Nyrup-stjórnin (og Frank Jensen) soleiðis niður til føroyingar, at tað mest minnir um, tá ein pápi í gomlum døgum tyktaði síni børn, men segði: Hetta er alt fyri tína egnu skyld og tú fert at takka mær seinni.

## Hvussu steðgaðu samráðingarnar?

Eg haldi, at danska embætsverkið og Nyrup-stjórnin vórðu sera dugnalig at steðga fullveldissamráðingunum. Tey vistu, at um tú fyrst trýstir á pengapungin, so fært tú fyri tað fyrsta teir táverandi andstøðuflokkarnir í Føroyum at ræða føroyingar við mistari vælferð. Síðani vistu tey eisini, at um tú bara dregur samráðingarnar út og trýstir á røttu knøttarnar, so fært tú eisini split ímillum táverandi samgonguflokkarnar. Um tú hartil roynir at lýsa loysingarrørsluna og serliga Tjóðveldisflokkin sum rabiatar og kantutar kanuttar, so er tað ein gáva til allar hinar flokkarnar, sum vilja leggja frástøðu til Tjóðveldisflokkin. Harafturat kanst tú eisini í danska almenninginum hanga føroyingar út sum nassarar, ið vilja gera sær dælt av donskum pengum í mong ár, og sum eru ótakksamir fyri alt sum dankarm hevur gjørt fyri teir.

Hetta visti Nyrup væl og spældi kortini sera dugnaliga. Vit, sum samráddust fyri landsstýrið, dugdu als ikki at standa ímóti í hesum spæli og vóru alt ov ósamd innanhýsis, so tað var bert ein spurningur um tíð, áðrenn split kom í.

Og so áttu vit eisini at havt gjørt okkum púra greitt frá byrjan: Nyrup-stjórnin fór ongantíð at gera nakað, sum gekk ímóti tí, sum føroyski javnaðarflokkurin vildi. Sum fleiri av teimum framstandandi fólkunum donsku megin borðið hava sagt mær síðani: Nyrup kundi ikki gera annað. Tann avgerandi atkvøðan undir donsku stjórnini, var jú tann hjá føroyska javnaðarumboðnum á fólkatingi. Um Nyrup gjørdi nakað, sum gekk beint ímóti føroyska javnaðarumboðnum, so kundi stjórnin beinanvegin fingið ein meiriluta ímóti sær í javnvágini millum andstøðu og stjórn á fólkatingi.

Tí var tað sera naivt av okkum í landsstýrissamgonguni at trúgva, at javnaðarflokkurin í Føroyum fór at hálsa um og stuðla fullveldisætlanini. Og tí kundu vit sitið alt valskeiðið út og samráðst, uttan at nakað úrslit kom á borðið.

Nyrup-stjórnin koyrdi hart á - og tað eydnaðist. Í dag endurtekur Frank Jensen so sama sjónleikin, ið tá varð spældur.

> »Eins og allir Hollywoood-filmar, so er søgan hjá Frank Jensen uppspunnin og partur av einføldum undirhaldi, sum hann roknar við, at hansara floksfelagar í Føroyum vilja hava…«

## Fullveldi økir ongan stættarmun

Uppáhaldið hjá Frank Jensen um, at fullveldi hevði økt stættarmunin í Føroyum, er sjálvandi partur av tí stóra bluffinum, sum trúttað er niður í føroyingar í mong ár. Danskir pengar í Føroyum eru altíð farnir til at stuðla teimum ríkastu og hava sloppið teimum vælbjargaðu og vinnulívspekulantum undan ábyrgd fyri at gjalda fyri okkara felags væleferð. Hugsa bert um studningin til vinnulívið og bankabjargingarnar.

Meðan fullveldissamgongan sat og minkaði blokkstuðulin, hendu størstu sosialu betringar í Føroyum í mong ár og stættarmunurin minkaði. Í dag gongur sjón fyri søgn, at ein føroysk samgonga við javnaðarflokkinum á odda, er í ferð við at økja stættarmunin almikið við grovum skattalættum til tey ríkastu, studningi og serskipanum fyri útvaldar samfelagsbólkar. Harafturat var tað beinleiðis við fullveldinum sum drívmegi, at tað eydnaðist at forða fyri, at studningsørskapurin varð uppafturtikin frá 1998-2003.

> »Trupulleikin hjá donsku stjórnini í mun til stjórnir í øðrum kolonilondum, er bert tann, at hon í neyvum samstarvi við føroyskar flokkar, hevur billað føroyingum inn, at Danmark hevur ongin áhugamál í at hava Føroyar undir sínum valdi. At Danmark bert verjir okkum móti tí stóru verð og vil tryggja vælferðina hjá føroyingum. Og hendan fjanti-søgan er serliga skapt í søguliga samstarvinum millum føroyskar og danskar socialdemokratar…«

## Ongin fjaldur bandupptakari

Royndin hjá Frank Jensen at endurtaka fordómsfullu myndina av teimum óndu fullveldisfólkunum við Høgna Hoydal á odda, er sjálvandi eisini bluff og sjónleikur.

Í fyrsta lagi vórðu allar avtalur brotnar um eina síðiliga samráðing. Allar royndir at gera eina avtalaða og felags mannagoingd fyri samráðingarnar vórðu sópaðar á borðinum, longu tá fyrsti samráðingarfundur byrjaði. Tí bað landsstýrið um steðg í fundinum - og meðan føroyska samráðinarnevndin sat í einrúmi og viðgjørdi , um tað yvirhøvur loysti seg at halda fram, helt Nyrup pressufund um fíggjarliga trýstið á føroyska almenningin.

Tá skuldu samráðingarna longu verið avblástar, men semja fekst ikki um tað føroysku megin.

Undir samráðingunum í Keypmannahavn varnaðust føroysk embætisfólk , at tey donsku embætisfólkini nýttu diktafonir- altso smáar bandupptakarar - helst til tess at kunna skriva fullfíggjaðar fundarfrágreiðingar.

Vit hildu onki løgið vera í hesum. Vit høvdu jú skotið upp, at allir teir formligu samráðingarfundirnir vórðu tiknir uppá sjónband. Tað varð greitt afturvíst av Nyrup-stjórnini.

Vit høvdu eisini skotið upp, at felags fundarfrágreiðingar vórðu skrivaðar eftir hvønn fund, sum partarnir vóru samdir um. Hetta varð eisini greitt afturvíst. So ongantíð betur, um alt varð tikið upp á ljóðband.

Á fundinum í Føroyum millum undirritaða og Frank Jensen hevði eitt av føroysku embætisfólkunum eisini eina diktafon á borðinum - mitt á borðinum, ein góðan metur frá Frank Jensen. Og undir fundinum varð bandið skift fleiri ferðir. Hetta til tess at kunnað skriva eina fullfíggjaða fundarfrágreiðing.

Har varð onki fjalt og ongin tók hetta uppá mál yvirhøvur. Men sum fundurin leið, komu ymsar grundleggjandi ósemjur fram. Danski løgmálaráðharrin segði millum annað í sera kontantum orðum, hvørja støðu danska stjórnin hevði til rættindini hjá føroysku tjóðini og hvat vald, Danmark ger krav upp á í Føroyum.

Eftir hesa hending bað hann um steðg í fundinum og vit fóru í einrúm báðir. Har vildi hann vera við, at teir ongantíð høvdu góðtikið, at fundurin skuldi takast upp á band, og hann bað meg bønliga um, at bondini vórðu koyrd burtur. Hann legði eisini dent á, at hann vildi ikki halda fram við fundinum, um ikki bandupptakarin varð tikin av borðinum og bondini vórðu slettað. Eg segði, at eg skilti ikki rættiliga trupulleikan. Endamálið mátti vera, at vit fingu eina so eftirfarandi og neyva frundarfrágreiðing sum gjørligt. Men um tað hevði so stóran týdning fyri hann, og um tað var ein treyt fyri at halda fram við fundinum, so skuldi eg tryggja, at vit beindu bandupptakaran og bondini burtur. Og hesi boð gav eg embætisfólkunum.

## Hvør vil fjala veruleikan?

Sostatt var onki fjalt ella løgið í framferðini hjá embætisfólkunum. Eg helt sjálvur, at tað var ein fínur háttur at skjalfesta og skjalprógva samráðingargongdina - serliga tá danska stjórnin noktaði at gera felags fundarfrágreiðingar.

Eg havi als ongar trupulleikar av um so er, danska stjórnin hevur tikið alt upp á band, sum eg havi sagt undir samráðingum ella í telefonsarmøðum - og sjálvandi hava tey tað.

Tað hevði verið ein stórur demokratiskur fyrimunur og ein fongur fyri eftirtíðina og søguskrivingina, um alt varð lagt alment fram og vit sluppu undan at keglast um, hvør segði hvat.

Men hvør er trupulleikin hjá Frank Jensen og donsku stjórnini?

Hví tók Frank Jensen knappliga spurningin upp mitt á fundinum í Føroyum, hóast øll høvdu sæð hetta frá byrjan? Hevði hann sagt okkurt, sum hann angraði?

Hví noktaði danska stjórnin í felag at skjalfesta alt, sum fór fram ella at gera felags fundarfrágreiðingar?

Kann tað hugsast, at tað hevði verið ein stórur trupulleiki hjá donsku stjórnini og hjá teimum føroysku flokkunum, ið altíð gera Tjóðveldisflokkin til trupulleikan, um alt kom alment fram fyri føroyingar?

Kann tað hugsast, at um søgufrøðingar og fólk annars fingu fult innlit í samráðingarnar, so hevði ikki borið til longur at spælt tann sjónleik úteftir, sum stútt og støðugt verður spældur?

Kann tað hugsast, at tá hevði ikki borið til aftur og aftur at spælt henda Hollywood-filmin um tað góðu donsku stjórnina og teir ó-føru sosialdemokrarnar sum hugsa um vælferðina hjá føroyingum og sum berjast ímóti tí ónda og kantuta og dogmatiska fullveldisliðnum?

---

GG! Minnist til, at hetta er bara mín útgáva av hendingunum. Spyrjið onnur og roynið at leita fram tilfar - og ikki minst, hugsið um hvør hevur áhuga í hvørjari útlegging av søguni - so tit kunnu gera tykkara egnu metingar.